

Áheitan á fíggjarmálaráðharran

# Hestleiðin nú og í framtíðini



Arbeiðið at gera Sandoyartunnilin gongur við rúkandi ferð og verður helst liðugt til tíðina. Áðrenn vit hava vent okkum, eru vit við árslok 2023. Tá er ov seint at fara ígongd við at finna loysnir á Hestleiðini.

Eg vil hervið enn einaferð koma við eini áheitan á fíggjarmálaráðharran, sum varar av samferðslumálum, um at koma við eini fráboðan um, hvørjar ætlanir hann hevur við Hestleiðini.

Samstundis vil eg rætta út eina hond út til landsstýrismannin soleiðis, at hestfólk, kommunan og landið í felag finna eina loysa, sum øll kunnu liva við.

Gjøgnum ár og dagar hava skiftandi landsstýrisfólk, tingfólk og kommunalpolitikarar, víst á týdningin av, at vit varðveita útoyggjarnar.

Útoyggjaálitið frá 2001 verður ofta tikið fram og við jøvnum millumbilum minnir Útoyggjafelagið okkum á, at ein fyritreyt er eitt trygt og støðugt ferðasamband.

Í nýggjastu samferðsluætlanini 2018-2030 hjá landinum verður spurningurin um smáplássini eisini umrøddur: “Ein viðkomandi spurningur er, hvørjar Føroyar, føroyingar ynskja sær. Einar miðsavnaðar Føroyar, har smáplássini falla, ella varðveitslu av lívinum á smærru plássunum, hóast umstøðurnar har eru truplar, tí upprunaligu Føroyar skulu varðveitast? Eingin ivi er um, at upprunaligu Føroyar ikki skulu hvørva, hóast samfelagið er í støðugari menning.”

Hesum taka allir føroyingar helst undir við. Eisini borgarstjórin í Tórshavnar kommunu.

Longri er tó ímillum átøkini, sum eru neyðug at fremja, skal lív verða lagað á hesum oyggjum.

Ein grundleggjandi fyritreyt er gott ferðasamband. Tað er ikki nøkur einføld uppgáva við verandi ferjuflota og fíggjarkarmi hjá Strandferðsluni. Tað kenni eg alt til frá tíðini, eg sjálvur sat sum landsstýrismaður, og valdi at seta Spógvan og Jósup inn fyri at bøta um ferðasambandið út í Hest.

Henda áheitan snýr seg um Hestleiðina. Tað merkir ikki, at ferðasambandið til Nólsoynna og Koltur er gloymt. Málið er sjálvsagt, at nøktandi ferðasamband verður til allar oyggjarnar í Tórshavnar kommunu.

## Finna loysnir saman við landinum

Eg havi í fleiri førum heitt á landsstýrisfólk við ábyrgd av rutunum millum oyggjar í Føroyum um at betra um ferðasambandið og at finna eina loysn á Hestleiðini, áðrenn Sandoyartunnilin letur upp.

Tíðliga í vár tók eg saman við hestfólki stig til ein fund við fíggjarmálaráðharran Una Rasmussen.

Fundurin var tann 17. mars, har undirritaði sjálvur, Hestnevndin, umboð fyri umsitingina í Tórshavnar kommunu og Tórshavnar Havn, og landsstýrismaðurin við embætisfólkum úr Fíggjarmálaráðnum, umboð fyri Landsverk, Strandferðsluna og Teistanevndina sótu um sama borð og umrøddu Hestleiðina.

Endamálið var at varpa ljós á avbjóðingarnar við Hestleiðini, og hvørji atlit eiga at takast, nú loysnir skulu finnast á Hestleiðini, tá Sandoyartunnilin verður tikin í nýtslu síðst í 2023.

Harumframt vildi eg vísa, at Tórshavnar kommuna ynskir at finna loysnir á Hestleiðini, sum øll kunnu liva við.

Landsstýrismaðurin lurtaði eftir sjónarmiðunum og varð kunnaður um, at hann fór at fáa eitt skriv, ið lýsir sjónarmiðini og tørvin hjá hestfólki á ferðasambandi nú, og tá koyrandi verður millum meginøkið og Sandoynna.

Umboð fyri hestfólk hava sent skriv við sjónarmiðunum hjá hestfólki. Í skrivinum verður víst á at avbjóðingar eru, og hvørji atlit skulu takast, tá avgerð skal takast um Hestleiðina nú og longri fram í tíðina.

Skrivið er viðlagt soleiðis, at landsstýrismaðurin kann fáa sjónarmiðini frá hestfólki í fullum líki.

## Hvat ætlar landsstýrið við Hestleiðini?

Fíggjarmálaráðharrin Uni Rasmussen, sum hevur ábyrgd av samferðslumálum, hevur boðað frá, at tað skal fyriliggja ein haldgóð loysn, hvussu farleiðin skal skipast, tá Sandoyartunnilin letur upp fyri ferðslu.

Hilmar Eliasen, fyrrverandi stjórin á Strandferðsluni hevur í samrøðu við Sosialin boðað frá, at tað verður ikki Teistin, men Erla Kongsdóttir, sum skal sigla millum Hest og Gomlurætt, tá siglingin um Skopunarfjørð steðgar. Hilmar Eliasen vísti á, at Teistin er serbygdur til Sandoyarleiðina, og at ferjan er alt ov stór og dýr í rakstri bara at sigla út í Hest.

Sambært Hilmari Eliasen er Erla Kongsdóttir sera væl egnað til Hestleiðina, bæði tí hon er vælegnað til siglingina og tekur miðalstórar bilar til eitt nú oljuflutning, rusk og bussar. Hann boðaði samstundis frá, at ætlanin var, at Erla Kongsdóttir skuldi sigla í vár, og vísti eisini á, at hetta fór at krevja tillagingar á ferjuleguni í Hesti.

Nú er summarið farið, og enn vita hvørki hestfólk ella kommunan, hvussu verður við Hestleiðini.

Landsstýrismaðurin Uni Rasmussen hevur eisini boðað frá, at Strandferðslan skal umskipast, og at uppskot verður borið Løgtinginum í heyst. Hetta merkir helst, at virksemið heilt ella partvíst verður privatiserað.

Um vit skulu taka “pengabrillurnar” uppá, so loysir tað seg als ikki at hava ferðasamband út í Hest. So langt frá. Tað kemur helst heldur ongantíð at loysa seg fíggjarliga. Eg havi ilt við at ímynda mær, at nøkur





privat fyritøka fer at bjóða seg fram at reka farleiðina, um ikki onkur stuðul fylgir við.

Skulu vit varðveita lív í Hesti, má okkurt gerast við ferðasambandið, og tíðin er við at ganga undan, um ferðasamband skal vera, tá Sandoyartunnilin verður tikin í nýtslu.

## Hestfólk skulu hava somu møguleikar, sum aðrir føroyingar

Eg vil nýta høvið til at vísa á, at hestfólk hava somu rættindi sum aðrir føroyingar, og at flutningsskyldan hjá Strandferðsluni eisini fevnir um hestfólk.

Meginparturin av fólkinum í Føroyum kunnu í dag seta seg í bilin uttanfyri hurðina og ferðast ómakaleyst kring meginøkið. Vinnulívið kring Føroyar hevur góðar møguleikar at flyta vørur við Strandferðsluni, eins og vaksandi ferðavinnan nýtir væl av almenna ferðasambandinum til og frá oyggjunum. Somu møguleikar mugu vera hjá hestfólki.

Tí má ferðaætlanin longu nú leggjast soleiðis til rættis, at hestfólk kunnu búgva í oynni og arbeiða aðrastaðni í landinum. Tí mælir borgarstjórin til, at ferðaætlanin hjá Teistanum verður broytt soleiðis, at 5 túrar verða dagliga, og at tilkallast kann 30 min. frammanundan.

Tað er eisini sera umráðandi, at ein hóskandi ferja kemur at røkja siglingina, tá Sandoyartunnilin letur upp. Ivasamt er um Erla Kongsdóttir er rætta skipið.

Eg taki undir við sjónarmiðinum hjá Hestfólki, sum í skrivinum vísa á, at tey ikki duga at síggja, at eitt skip sum Erla Kongsdóttir nøktar tørvin á hestleiðini í framtíðini, og tey ivast eisini í, um ferjan megnar at flyta størri bilar sum t.d. olju – og ruskbilar. Strandferðslan hevur sett Erlu Kongsdóttir at røkja Kalsoyarleiðina, og bilar verða ikki tiknir við um Kalsoyarfjørð.

Tí er besta loysnin helst, at Teistin framhaldandi røkir Hestleiðina, til ein meira hóskandi ferja er útvegað. Eg vil so staðiliga mæla frá at selja Teistan, áðrenn ein onnur nøktandi loysn funnin til Hestleiðina.

Eg havi áður víst á, at ein loysn kundi verið at gjørt eina royndarverkætlan við Erlu Kongsdóttir soleiðis, at vit finna útav, um ferjan egnar seg til farleiðina, og um hon nøktar tørvin.

Eg fái meg illa at trúgva, at Strandferðslan ikki hevur vissað seg um, at Erla Kongsdóttir er egnað at sigla um fjørðin, og megnar at flyta olju- og ruskbilar yvir um, tá hugskotið um at seta Erlu Kongsdóttir inn hevur verið í umbúnað. Hetta eru sjálvsagdar fyritreytir.

Tað er eisini sera umráðandi, at talan verður um eina veruliga royndarverkætlan, og mann frammanundan ger sær greitt, hvat endamálið er, og hvussu metast skal um ferjan er hóskandi til farleiðina og nøktar tørvin hjá hestfólki. Tað skal eisini vera møguligt er at finna aðra loysn, um royndirnar vísa, at ferjan ikki kann brúkast. Eisini er umráðandi, at royndarverkætlanin verður tíðaravmarkað, men tó so mikið longi, at ferjan skal hava siglt allar árstíðir.

## Heystleið við visiónum

Tað kann verða ein avbjóðing at finna útav, um ein ferja kann nøkta tørvin.

Eg eri samdur við sjónarmiðinum hjá hestfólki um, at tað er ov snævurt einans at síggja Hestleiðina fyri tey, sum eru fastbúgvandi í Hesti.

Skulu vit gera okkum vónir um, at fleiri fólk skulu búseta seg í Hesti, mugu vit eisini skapa karmar fyri, at fólk, sum hava tilknýti til oynna, hava møguleika til at búleikast so nógv sum til ber í oynni.

Hestleiðin skal skipast soleiðis, at hædd eisini verður tikin fyri teim nógvu fólkunum, sum hava tilknýti til Hest, og javnan vitja í Hesti.

Hesi fólk eru við til at halda lív í oynni, og traðka til, tá fjøllini verða gingin, lembingin er fyri og tá seyðurin skal slaktast. Tað eru eisini hesi fólkini, sum eru við til at halda hagarnar og tryggja at hegn o.a. er í lagi. Harumframt eru tað eisini hesi fólkini, sum skipa fyri trivnaðartiltøkum, sum eru fyri bæði tey fastbúgvandi og vitjandi.

Tað kann eisini vera torført at meta, um ein ferja kann nøkta tørvin í framtíðini, serliga við tí vaksandi ferðavinnuni í huga.

Í Samferðsluætlanini 2018-2030 hjá landinum verður víst á, at stóri vøksturin innan ferðavinnuna seinnu árini hevur lagt eitt støðugt vaksandi trýst á Strandferðsluna, sum ikki hevur hóskandi ferjur til at flyta eitt økt tal av ferðafólki.

Hetta hava vit sæð á Suðuroyarleiðini, har Smyril er vorðin ov lítil til at nøkta tørvin á ferðafólka- og farmaflutningi. Suðuroyggin hevur brynjað seg út til ferðavinnuna, og tað eru ikki heilt fáir føroyingar og útlendingar, sum vitja oynna, nú alsamt fleiri ferðavinnutilboð eru í at velja.

Nýggi ferðavinnupolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu, “Fólk og ferðavinna – lið um lið” vísir millum annað á, at ferðavinnan verður mett at vera ein týðandi katalysator fyri at menna og nútímansgera samfeløg.

Hetta síggja vit longu í Havn, og ætlanin er, at oyggjarnar og bygdirnar skulu fáa størri ágóða av ferðavinnuni í framtíðini.

Kommunan hevur sett upp almenn vesi og skjól í Hesti, har ferðandi kunnu fáa skjól fyri veðri og vindi, og útstykkingin av summarhúsøkinum er ígongd. Um túratalið verður økt og møguleiki eisini verður fyri at brúka tyrluna, ivist eg onga løtu í, at alsamt fleiri ferðafólk fara at taka av teimum tilboðum, sum longu eru, og at hestfólk og fólk við tilknýti til Hest fáa møguleikar at skapa fleiri ferðavinnutilboð í oynni.



Í mun til varandi loysnir á Hestleiðini, so eri eg enn sannførdur um, at Hestoyggin skal knýtast uppí Sandoyartunnilin. Hetta er uttan iva tann besta og bíligasta loysnin, tá samanum kemur.

Hetta er tó ein loysn sum helst liggur nokk so nógv ár frammi, men tað er umráðandi, at vit ikki gloyma henda møguleika og kanna, um hetta ber til.

Aðrar oyggjar í landinum hava eisini tyrluflutning, sum er eitt gott ískoyti til ferjusambandið, og sum hevur til endamáls at varðveita bústaðar- og vinnuøki á útoyggjunum.

Hesin møguleiki er ikki í Hesti, tí ongin tyrlupallur er í oynni. Eg haldi, at tyrlusamband eigur at vera partur av eini samferðsluætlan fyri Hest, tí tyrluflutningur kann gera stóran mun, bæði í mun til ferðafólkaflutning, og ikki minst, tá vørur og tilfar til landbúnaðarvirksemi skal fáast til oynna.

## Kommunan ábyrgdina av ferjuleguni

Kommunan hevur gjørt stórar íløgur í ferjuleguna í Hesti. Ferjulegan er vælegnað til Teistan og onnur størri skip. Skal ein minni ferja setast inn, mugu tillagingar helst gerast á ferjuleguna. Hetta er ein kommunal uppgáva, og ikki ein uppgáva, sum kann loysast eftir einum degi. Tað krevur eitt ávíst fyrireikingararbeiði, tí atlit mugu takast til skipið, sum skal sigla, og viðurskiftini við fjøru og flóð, sum hestfólk eisini vísa á. Talan er um eina íløgu, sum skal játtast av býráðnum.

Eg eri sinnaður til at gera mítt til, at hetta verður møguligt, men tað hastar at fáa eina afturmelding frá landsstýrismanninum, um hann fer at gera eina royndarverkætlan, ella hann hevur aðrar ætlanir um, hvussu Hestleiðin verður skipað frameftir.

Hestfólk vísa á, at tað er umráðandi, at ferjulegan ikki verður broytt so nógv, at tað ikki er møguligt hjá størri skipum at fáa lagt at í framtíðini. Hesum taki eg undir við og skal í hesum sambandi vísa á, at kommunan hevur gjørt tillagingar á ferjuleguni í Nólsoy, tá Erla Kongsdóttir varð sett í sigling um Nólsoyarfjørð, og samstundis varð ferjulegan varðveitt soleiðis, at Ternan og onnur størri skip fáa lagt at.

## Komið nú í gongd

Eg havi enn einaferð greitt frá mínum sjónarmiðum um:

- økt túratal nú
- hóskandi ferja at røkja Hestleiðina
- tíðaravmarkað royndarverkætlan við Erlu Kongsdóttir
- málið má verða at knýta Hest uppí Sandoyartunnilin
- tyrluflutningur partur av Hestleiðini
- ferjulegan tillagast soleiðis, at bæði stórar og smærri ferjur kunnu leggja at

Eg vil enn einaferð staðiliga heita á fíggjarmálaráðharran, um at gera sítt til, at ferðasambandið á Hestleiðini framyvir kemur at taka atlit til tey, sum eru fastbúgvandi, tey sum hava tilknýti til oynna og til ferðavinnuna í Hesti. Eisini vil eg heita á Una Rasmussen, um at lurta eftir sjónarmiðunum og ynskjunum frá hestfólki til Hestleiðina.

Tað skal vera mín vón, at fráboðanin frá landsstýrismanninum um Hestleiðina kemur skjótt, soleiðis at farast kann í gongd við arbeiðið.

Við vón um skjót fundarboð.

**Heðin Mortensen**
borgarstjóri









# Um Hestleiðina – sjónarmið frá hestfólki

Her er ein samanfatan av, hvør tørvur er á rutunetinum á Hestleiðini. Í stuttum kann sigast, at ferðasambandið á leiðini er ónøktandi, tí oyggin fær ov fáar dagligar túrar.

Samanbera vit Hestleiðina í dag og hyggja áratíggju aftur í tíðina, so eru bæði skip og títtleiki betur enn fyri 50 árum síðan. Og tað er eisini tann natúrliga gongdin, tí allastaðni í landinum roynir mann at gera ábøtur á samferðslunetið.

## Søguliga

Fyrst í 1970-unum vóru á leið 3 túrar um vikuna millum Hest og Havnina. Sum árini gingu fekk oyggin ferðasamband hvønn dag, og summar dagar tvær ferðir um dagin (fríggjadag og sunnudag, soleiðis at framhaldsskúlanæmingar kundu sleppa út í Hest um vikuskiftini). Tá var ikki møguligt hjá skúlanæmingunum at búgva í Hesti og ganga í skúla í Havn.

Nøkulunda áleið aldarskiftið gjørdist tað endiliga møguligt at búgva í Hesti og arbeiða/ganga í skúla í Havn, tí tá fingu hestfólk fart kl. 7 yvir á Gomlurætt mánadag til fríggjadag. Ferjan, sum fór úr Skopun nakað áðrenn kl. 7, legði at í Hesti á veg yvir á Gomlurætt. Ein morguntúrur hevði leingi verið eitt ynski hjá hestfólki, so hetta var eitt gott og neyðugt framstig.

Hesi næstu árini hevði Hestur eitt hampiliga gott ferðasamband, har gjørligt var at fara til Havnar tíðliga um morgunin og aftur út í Hest seint seinnapartin. Fram móti 2016 vóru í fleiri ár 4-5 túrar dagliga – kl. 7.00 (Hestur-Gamlarætt), 8.45 (Gamlarætt-Hestur), kl. 17.15 (Gamlarætt-Hestur-Skopun) og so ein á leið um 19.30-tíðina. Nakrar dagar í vikuni vóru haraftrat túrar kl. 14.30.

Viðvíkjandi bilum, so ber í dag væl til at fáa bilin út í Hest, tí Teistin tekur nógvar bilar. Eisini bar til at fáa bil við í Hest, tá ið Tróndur og Sam sigldu onkur tíðarskeið. Við Rituni, sum sigldi nógv upp á Hest í 70-unum og 80-unum var gjørligt at fáa akfør við í oynna, men tá skuldi bilurin heysast umborð við krana.

## Bumbað aftur í tíðina í 2016

At kalla øll árini hevur ferðasambandið í Hesti verið knýtt saman við Sandoyarleiðini – og nøkur tíðarskeið eisini við Koltursleiðini.

Men í november 2016 broyttist alt. SSL avgjørdi, at rutusambandið um Hestfjørð og Skopunarfjørð skuldi skiljast púra sundur. Í tí sambandinum strikaði SSL útvið 40% av túrunum millum Hest og Gomlurætt. Túrurin kl. 7.00 varð strikaður og tað sama við túrinum kl. 17.15.

Hetta var ein sera dyggur smeitur fyri hestfólk. Knappliga hvarv møguleikin at búgva í Hesti og hava eitt arbeiði/ganga í skúla á meginøkinum.

## Ferðaætlanin í dag

Niðanfyri er prentað ferðaætlan á leið 61, sum er leiðin Gamlarætt-Hestur, soleiðis sum hon sær út í dag.

Stutt sagt, hevur Hestur bara 2 túrar dagliga týsdag, hósdag og leygardag. Og 3 túrar dagliga mánadag, mikudag, fríggjadag og sunnudag. Allir túrar eru tilkalling. Hetta merkir, at ringjast skal umborð á Teistan og bíleggja fartin í minsta lagi 1,5 tíma áðrenn fráferð av Gomlurætt.

*Sigast skal, at í 2019 og partvís 2020 var Spógvin eitt tíðarskeið settur í sigling millum Hest og Gomlurætt, og hetta tíðarskeiðið fingu hestfólk mistu túrarnar aftur – men tó við einum ótíðarhóskandi báti.*

## Ótíðarhóskandi

Hestfólk halda, at ferðaætlanin er sera ótíðarhóskandi, tí ov fáir túrar eru. Hetta hevur fleiri óhepnar avleiðingar við sær.

- Við verandi ferðaætlan ber ikki til at búgva í Hesti og arbeiða ella ganga í skúla í Havn. Fyrsti fartur úr oynni er kl. 9.05, og hetta merkir, at tú í fyrsta lagi kann møta til arbeiðis ella í skúla í Havn út móti klokkan 10. Hetta ger tað trupult hjá fólki undir pensjónsaldur at búgva í Hesti.
- Tað er óhøgligt hjá hestfólki at sleppa til lækna og onnur ørindi í miðstaðarøkinum. Skalt tú t.d. til lækna kl 14, mást tú fara úr Hesti kl 9.05 og tú ert ikki aftur í oynni fyrr enn kl 19.30
- Ferðaætlanin ger tað avbjóðandi at reka ferðavinnu í oynni, tí ov langt er millum túrarnar – serliga týsdag, hósdag og leygardag. Tað hendir meira enn so, at arbeiðspláss, sum ætla sær starvsfólkaútferð leygardag, velja Hest frá, tí tað er ov langt millum túrarnar.
- Tað kann vera trupult og óneyðuga dýrt at fáa handverkarar út í Hest at gera umvælingar, tí teir mugu vera fleiri tímar í oynni, hóast uppgávan bara tekur ein hálvan tíma.

**LEIÐ 61 GAMLARÆTT – HESTUR** Skip: M/F Teistin Siglingartíð: 20 min.

| Av/Úr | Mán. | Týs. | Mik. | Hós. | Frí. | Ley. | Sun. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Gamlarætt | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 |
| Hestur | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 |
| Gamlarætt | 14.30 | | 14.30 | | 14.30 | | 14.30 |
| Hestur | 14.50 | | 14.50 | | 14.50 | | 14.50 |
| Gamlarætt | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 |
| Hestur | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 |

Tilkalling er til allar túrar á tel. 29 31 03 1,5 tíma áðrenn fráferð av Gomlurætt.
Komutíðir og fráferðir kunnu verða broyttar av veðri og streymi.



## Fólkatal

Í dag eru 17 fólk skrásett at búgva í Hesti. Yngsta fólkið er 55 ár og elsta fólkið 87 ár.

Fólkatalið í Hesti er minkað munandi seinastu áratíggjuni. Hetta er ein gongd, sum sæst aðrastaðni á smáplássum, men eftir okkara tykki eigur tað at vera gjørligt at fáa fólkatalið upp – í øllum førum partar av árinum. Men fyri at hetta skal lata seg gera, er alneyðugt við nøktandi ferðasambandi.

Hestur skal hava eitt ferðasamband, sum ger tað møguligt at:

- búgva/gista í Hesti og ganga í skúla/arbeiða í Havn
- fara til Havnar í læknaørindum/til handils/banka o.a.
- reka ferðavinnu í oynni
- reka landbúnað í oynni
- fáa handverkarar o.a. tænastuveitingar í oynna

Vit vita um ungfólk, sum hava hug at seta búgv í oynni, men í løtuni er hetta ógjørligt við vánaliga ferðasambandinum.

Umframt tey fastbúgvandi er ein rúgva av fólki, sum hava tilknýti til oynna og sum javnan eru í Hesti – fleiri teirra gista nógv í Hesti serliga summarhálvuna, tá landbúnaðararbeiði og ferðavinna eru í hæddini.

## Neyðugir túrar her og nú

Niðanfyri er eitt uppskot um, hvat fyri túrar hestfólk halda vera tørvur á her og nú. Vit ynskja tilkalling til allar túrar hálvan tíma áðrenn fráferð, tó ikki av Gomlurætt/Skopun. Av tí at allir túrar eru tilkalling, meta vit, at hetta átti at latið seg gjørt.

Vit eru greið yvir at í løtuni er neyðugt við nøkrum rutum, ið eru tengdar at Sandoyarleiðini. Tá Sandoyartunnilin letur upp í 2023 er ikki neyðugt at sigla um Skopunarfjørð meira.

Eftir at Sandoyartunnilin er komin, kundi ferðaætlanin sæð eitt sindur øðrvísi út, tó so, ynskja vit fimm túrar vikudagarnar og fýra/tríggjar túrar í vikuskiftinum.

## Ferjan

Tað er sera umráðandi at tað ber til at fáa bilar aftur og fram á hvørjari rutu á ferjuni, ið røkir hestleiðina. Fleiri ferðir um vikuna fara bilar um Hestfjørð við Teistanum. Serliga um vikuskiftini og um høgtíðirnar, tá tað ofta kunnu vera upp í 12-15 bilar í oynni. Men eisini mitt í viku er tørvur á at hava bil við sær til vøruflutning – tað kann vera matvørur, stikur, útgerð til ferðavinnu o.a.

Góð ferjulega er í Hesti og hestfólk hava seinastu umleið 30 árini havt ferju, sum tekur bilar. Tí er tað púra burturvið at tosa um, at hava eina ferju til Hestleiðina,

## Fólkatal í Hesti frá 1985-2022

| 1985 | 1990 | 1995 | 2000 | 2005 | 2010 | 2015 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 58 | 57 | 48 | 44 | 39 | 27 | 18 | 18 | 19 | 17 |

sum ongar bilar tekur. Hetta er tað sama sum at flyta farleiðina langt aftur í tíðina. Alla aðrastaðni í landinum verður roynt at betra samferðslukervið við tunlum, undirsjóvartunlum, vegum og betri ferðasambandi. Tí gevur tað onga meining at fara mótsattan veg, tá tað snýr seg um Hestoynna. Fólk á útoyggj hava sama tørv sum fólk í Havn ella Klaksvík at kunna koyra sínar vørur til hús og parkera í túninum.

Vit duga ikki at síggja at eitt skip, sum Erla Kongsdóttir nøktar tørvin á hestleiðini í framtíðini, t.d. tekur Erla Kongsdóttir bert bilar upp til 7 tons. Oljubilar, ruskbilar, renovationsbilar o.l. viga millum 25-32 tons. Harumframt tekur Erla Kongsdóttir bert einar 2 bilar. Hetta er ov lítið, tá hugsað verður um, at um vikuskiftini eru ofta munandi fleiri bilar enn hetta í oynni.

Eftir okkara tykki eigur ferjan á hestleiðini at taka í minsta lagi 7 persónbilar. Tað er SERA umráðandi, at hestfólk hava eina ferju, sum kann taka persónbilar HVØRJA ferð. Og hon eigur at kunna taka ruskbilar, oljubilar og líknandi akfør.

Eisini er neyðugt, at ferjan kann taka eini 80-100 fólk. Um summarið er fitt av ferðavinnuvirksemi í oynni, og fleiri bólkar tátta upp ímóti 100 fólkum. Summir eru uppaftur størri. Tí hevur tað týdning, at ferjan er lagað til vinnulívið í oynni.

Viðvíkjandi ferjuleguni, so hevur oyggin eina góða ferjulegu, har Teistin og onnur størri skip fáa lagt at. Tað er sera umráðandi, at ferjulegan ikki verður broytt soleiðis, at tað ikki ber til hjá størri ferjum at leggja at í framtíðini, um mann t.d. broytir verandi ferjulegu til eina, ið Erla Kongsdóttir kann brúka. Her hugsa vit hvør møguleikin er fyri t.d. eini hydrauliskari ferjulegu.

Um so er, at ein ferja skal sigla út í Hest, sum hevur rampu, skal rampan klára 1,3 m flóð og 1,3 m fjøru frá miðalvatni.

## Serlig tíðarskeið

Tað er serliga mánaðirnar frá mars til oktober, at nógv fólk er í Hesti. Tá fjøllini vera gingin í mars/apríl, skulu fjallfólk flytast í og av oynni. Tá liggja eisini páskirnar, har sera nógv fólk og bilar eru í Hesti.

Í mai og juni er nógv ferðavinnuvirksemi, tá starvsfólkaútferðirnar plaga at vera. Eisini vitja nógvir skúlanæmingar oynna á setursskúla. Hetta tíðarskeiðið er eisini virksemi við at seta eplir niður, hegna o.a.

Í juli og august er summarfrítíðin, og tá ferðast nógv fólk til og frá oynni. Her er eisini fjall og hoygging. Eisini eru starvsfólkaútferðir javnan í seinnu helvt av august.

Í september eru eplir, fjall og slakt fyri, og hetta hevur við sær nógva ferðing við fólki og bilum.

Harumframt eru nógv fólk í Hesti í jólafrítíðini, og tá kunnu vera upp í 12-15 bilar í oynni.

**LEIÐ 61 GAMLARÆTT – HESTUR – SKOPUN** **Skip: M/F Teistin**

| Av/Úr | Mán. | Týs. | Mik. | Hós. | Frí. | Ley. | Sun. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skopun | 06.45 | 06.45 | 06.45 | 06.45 | 06.45 | | |
| Hestur | 07.10 | 07.10 | 07.10 | 07.10 | 07.10 | | |
| Gamlarætt | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 | 08.45 |
| Hestur | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 | 09.05 |
| Gamlarætt | 14.30 | 14.30 | 14.30 | 14.30 | 14.30 | 14.30 | 14.30 |
| Hestur | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.50 |
| Gamlarætt | 17.20 | 17.20 | 17.20 | 17.20 | 17.20 | | |
| Hestur | 17.40 | 17.40 | 17.40 | 17.40 | 17.40 | | |
| Gamlarætt | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 | 19.10 |
| Hestur | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 | 19.30 |
| Gamlarætt | Uml.22.10 | Uml. 22.10 | Uml. 22.10 | Uml.22.10 | Uml. 22.10 | Uml.22.10 | |
| Hestur | Uml 22.30 | Uml.22.30 | Uml.22.30 | Uml.22.30 | Uml.22.30 | Uml.22.30 | |

Uppskot um, hvørjar túrar hestfólk halda tørv vera á her og nú.



## Fastbúgvandi – hvat er tað?

Í drúgva samskiftinum millum hestfólk og Strandfaraskip Landsins um vánaliga ferðasambandið hevur SSL støðugt ført fram, at tey gera ferðasamband fyri tey fastbúgvandi – undirforstaðið at hetta ikki er fyri ferðafólk ella hestfólk, sum ikki hava fastan bústað í Hesti.

Hetta er ein ógvuliga afturúrsigldur og undarligur háttur at síggja sína uppgávu. Ferðaætlanin eigur sjálvsagt at vera løgd til rættis eftir teimum, sum hava tørv á henni. Í dag búgva fá fólk í Hesti og fólkatalið er minkandi.

Hóast lága íbúgvaratalið eru nógv fólk, sum hava sera tætt tilknýti til oynna og sum eru nógv í Hesti. Fleiri teirra eiga hús í oynni – antin einsamøll ella saman við øðrum. Hetta eru t.d. fólk, sum eru uppvaksin í Hesti, men sum búgva og arbeiða í Havn. Eisini hava nógv børn og barnabørn hjá hesum tætt samband við oynna og vitja nógv um vikuskiftini, í ferium og tá ymiskt arbeiði og tiltøk eru í Hesti. Nógv hava jørð og seyð í Hesti og hetta krevur, at tey eru javnan í bygdini í sambandi við fjall, lembing, slakt, hegning o.a. virksemi.

Ferðaætlanin eigur sjálvsagt at verða løgd til rætti eftir tørvinum, bæði hjá fastbúgvandi OG teimum, sum brúka farleiðina nógv. Sum áður greitt frá verður farleiðin í dag HVØRKI løgd til rættis eftir fastbúgvandi ella øðrum, sum vitja oynna í styttri og longri tíðarskeið.

SSL hevur ferð eftir ferð ført fram, at fastbúgvandi hestfólk sum heild eru nøgd við ferðaætlanina. Hetta er beinleiðis ósatt. SSL hevur ongantíð gjørt eina kanning millum hestfólk av verandi ferðaætlan. Tvørturímóti hava hestfólk fleiri ferðir skrivliga boðað SSL frá, at ferðaætlanin er sera ónøktandi.

Í dag og í framtíðini skulu vit eisini ansa eftir ikki at skilja so neyvt ímillum fastbúgvandi og ikki fastbúgvandi. Fólk eru meira mobil í dag, og nógv hava ein livihátt, har tey hava sín primera bústað eitt stað, men búgva partar av tíðini í øðrum stað. Hetta letur seg m.a. gera, tí tað ber til at røkja summar arbeiðsuppgávur við teldu og netsambandi.

Summi ungfólk eru forvitin eftir at royna bygdalívið og vita um tey trívast. Besti hátturin at vita, um ein trívist, er at búgva á staðnum eina tíð. Men í Hesti hava ungfólk ikki møguleika at royna hetta, tí tey mugu siga skúla og starv frá sær, um tey eitt tíðarskeið flyta út í Hest. Hetta er stórt spell, tí hetta tekur púrasta grundarlagið undan, at fólkatalið kann økjast í oynni.

Áskoðanin hjá SSL um at ferðasambandið út í Hest ikki er fyri ferðafólk og ferðavinnu er eisini ein løgin háttur at síggja vinnulív uppá. Fólk í Hesti reka ferðavinnu og sjálvsagt eigur ferðavinna at líkastillast við aðra vinnu, eitt nú fiskivinnu, aling og annað. SSL veitir skip og tænastur til flutning av fiski og øðrum farmi hjá vinnulívinum, og tí er tað ein sjálvfylgja, at tann vinnan, sum eitur ferðavinna, fær somu sømdir.

Umráðandi er at minnast til, at tá ferðasambandið í Hest skal bøtast, kann ikki væntast, at eitt "úrslit" kemur beinanvegin og at fólk fara at streyma út í Hest at búgva. Slíkt tekur fleiri ár at byggja upp. Vit skulu minnast til, at ferðasambandið hevur verið sera vánaligt síðan 2016, og tey munnu vera fá, sum tora at flyta út í oynna eftir eitt tíðarskeið við so vánaligum sambandi. Áðrenn fólk flyta á eina útoyggj vilja tey vera vís í, at tey hava eitt ordiligt ferðasamband og at ferðaætlanin ikki brádliga verður broytt til tað verra. Tískil má ein loysn á Hestleiðini vera langsiktað og ikki vera avbrotin av ótolni um at síggja úrslit eftir nakrar vikur.

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA